# VEÐRIÐ Í LEIRVÍK



# JANUAR 2023

# VEÐURSTOVA FØROYA

# Innihald


Leirvík ........ 3
Veðrið í bygdini ........ 4
- Norðan ........ 6
- Landnyrðingur norðan ........ 6
- Landnyrðingur ........ 6
- Landnyrðingur eystan ........ 6
- Eystan ........ 7
- Landsynningur eystan ........ 8
- Landsynningur ........ 8
- Landsynningur sunnan ........ 9
- Sunnan ........ 10
- Útsynningur sunnan ........ 10
- Útsynningur ........ 11
- Útsynningur vestan ........ 11
- Vestan ........ 11
- Útnyrðingur vestan ........ 12
- Útnyrðingur ........ 12
- Útnyrðingur norðan ........ 13

Spurningar og svar ........ **Fejl! Bogmærke er ikke defineret.**


**<u>Dagfesting</u>**: 9. januar 2023

**<u>Staður</u>**: Sjóvartún 11 – 520 Leirvík

**<u>Heimildarfólk</u>:** Sørin Djurhuus, tilbúgvingarleiðari – saman við Sjúrði Eliasen, Ólavi Heinesen, Eivindi Hansen og Jóan Peturi Eliasen

**<u>Viðtal við</u>**: Hanus Kjølbro

# Leirvík

Leirvík er bygd á Eysturoy, miðskeiðis á eystursíðuni.

Úr bygdini í útnyrðing um norðan niður í landsynning eystan er hav – Leirvíksfjørður. Úr landsynningi um sunnan og upp í útnyrðing eru fjøll – høg og miðalhøg.

Í landsynning úr Leirvíksbygd er Sigatindur (612m) og í útsynning úr bygdini er Knúkur (460m). Úr Sigatindi og vestur til Knúk er ein lægri fjallarøð. Í beinan vestan úr bygdini er Ritafjall (641m).




Mynd 1: Kort av Eysturoy. Leirvík er á eystursíðuni, miðskeiðis á oynni.

Leirvík er bygt niðast í einum stórum dali, sum er opin út í Leirvíksfjørð úr norði niður í eystan. Sjálvur dalurin er opin ímóti landnyrðingi.

Liggur hann úr útnyrðingi um norðan til landnyrðing, er einki, sum verjir fyri ættini.

Er ættin av landsynningi suðurum og upp í vestan, ávirka fjøllini veðrið í Leirvík. Í góðum veðri við lítlum vindi verja tey væl ímóti lotinum, men er nógvur vindur í illveðri, eru harðar hvirur.



Mynd 2: *Leirvík og fjallarøðin avmyndað í vesturhallan sunnan. Fjallið vinstrumegin er Sigatindur (612m) og fjallið nakað høgrumegin miðjuna á myndini er Knúkur (460m). Lægsta punktið á røðini ímillum Sigatind og Knúk er Dvørgaskarð (315m). Fjøll og fjallarøðin verja ímóti lotinum, tá ið vindurin ikki er nógvur, men gera harðar hvirlur, tá ið tað er nakað av vindi. Útsynningur sunnan er ringasta ættin í Leirvík. Tá kemur vindur oman av røðini bæði eystan- og vestan fyri Knúk. Besta ættin til vind er útnyrðingur, sum er tvørtur um myndina, úr høgru ímóti vinstru.*

## Veðrið í bygdini

Veðrið í Leirvík er sera nær tengt at ættini. Sveiggini ímillum gott og ringt veður kunnu vera stór, og bert lítil munur í ættini kann gera stóran mun í veðrinum. Er liggjandi góðveður á sumri av landsynningi ella eystri í nakrar dagar, kann vera sera lýtt og gott veður við klárum lofti og nógvari sól. Liggur hann av útsynningi suðuri, er vanliga nógvur vindur, á høgætt kann vera gjøgnumtreingjandi kuldi.

Alt meðan veðrið aðrastaðni í Føroyum kann vera munandi øðrvísi.

Fyri at fáa greiði á hvussu veðrið er á teimum ymsu ættunum í bygdini í Leirvík, hevur undirritaði fingið samband við Sørin S. Djurhuus (**SD**), tilbúgvinarleiðara í Eysturkommunu. **SD** hevur sett seg í samband við 7 leirvíkingar, sum vita um veðrið í bygdini.

Teir 7 eru:

- Jóan Petur Eliasen, sjómaður
- Edvin Joensen, lærari
- Eivind Hansen, fráfarin politistur
- Árni Lervig, sjómaður
- Sjúrður Eliasen, sjómaður
- Ólavur F. Olsen, sjómaður
- Ólavur Heinesen, sjómaður
- Janus Ryggshamar, havnameistari

Við til samrøðuna í kantinuni hjá sløkkiliðnum í Eysturkommunu í Leirvík hevði eg spurnarblað il allar 16 ættirnar, ið vanliga eru umtalaðar í bygdin:

- ➢ Er vindurin javnur ella ójavnur á ættini
- ➢ Er meira vindur í ættini enn aðrasteðs – ella øvugt

- Er ættin vát – t.e. regn, tá ið turt er aðrastaðni – ella øvugt
- Er hetta mjørkaætt?
- Er ættin vanliga ein góð ætt ella ein ring ætt – ber til at siga tað við fáum orðum?
- Onnur viðurskifti um ættina, søgur, fyribrigdi, hendingar o.s.fr.

Spurt varð somu spurningarnar ætt fyri ætt. Byrjað varð við norðan, og var farið allan kringin runt eystureftir, og steðgað var við heil- og hálv- og millumættirnar. Nógvar av millumættunum hava sama veður við sær, sum heil- ella hálvættin beint við.

Spurningar og svar og aðrar viðmerkingar síggjast aftast í hesum skjali.




*Mynd 3: Tær 32 ættirnar. Til samrøðuna eru ikki allar 32 ættirnar brúktar, men onnurhvør - t.e. heil-, hálv- og millumættirnar.*

## Norðan

Tá ið hann kemur av norði, er vindurin javnur í Leirvík. Hann fer suður ígjøgnum fjørðin. Tað kann vera nógvur vindur av norði, men ikki hvirluvindur.

Tey siga í Leirvík, at alt møguligt kundi henda á norði, tá ið tað bara var tann gamla keiin. Bilar og annað skolaðu út, neystahurðar brotnaðu o.s.fr.

Tá ið tað er norðan, er vindferðin tann sama sum miðal fyri landið.

Norðan er ikki eit vát ætt í Leirvík, men ofa eru ælingar í ættini.

Norðan er ikki mjørkaætt í Leirvík.

Norðan er góð ætt í Leirvík – ikki skaðaætt. Køld ætt á vetri og kann geva nógv brim (*sjóvarfalsbrim*).

## Landnyrðingur norðan

Á landnyrðingi norði byrjar Kallurin – t.e. norðurendin á Kalsoy – at taka av lotinum. Tí er ættin eitt sindur frægari til vind enn beinur norðan.

Í aðrar mátar er landnyrðingur norðan tað sama sum beinur norðan.

## Landnyrðingur

Tá ið tað er landnyrðingur, merkist lítið til vind í Leirvík. Tað er so at siga stilli. Eisini tá ið vindferðin kring landið er upp í 20 m/s.

Ættin er vanliga ikki vát – tað er ikki samregn á ættini. Góður hoyterri.

Landnyrðingur er ikki mjørkaætt í Leirvík.

Landnyrðingur er nógv tann besta ættin í Leirvík. Fyrr varð sagt, at um tú ikki kanst bera kertuljós millum húsini á landnyrðingi, so ganga áttamannaførini burtur á Norðhavinum.

## Landnyrðingur eystan

Landnyrðingi eystan er góð ætt í Leirvík. Veðrið líkist veðrinum á landnyrðingi.




*Mynd 4: Myndin tikin í landnyrðing eystan. Á hesari ættini líkist veðrið veðrinum á landnyrðingi.*

## Eystan

Tá ið ættin er eystan, er vindurin javnur í Leirvík.

Vindurin er minni í Leirvík, enn hann er í miðal fyri landið.

Eysturættin er ikki vát í Leirvík, men veðrið kann vera ælut á vestfallinum. Eystan er ikki mjørkaætt, tó kann mjørki vera á vestfallinum.

Góð ætt í Leirvík – tó ikki líka góð sum landnyrðingur. Tað sæst meir til vindin, hann kemur av háskúlanum yvir um fjørðin.

## Landsynningur eystan

Veðri er nakað frægari ætt enn landsynningur. Tó er hann nakað keðiligur.



Mynd 5: *Myndin tikin í landsynning eystan. Liggur hann av landsynningi eystri, er kann veðrið vera eitt sindur keðiligt.*

## Landsynningur

Tá ið ættin er landsynningur, kemur hann norður við landinum, spílar seg út úti á Egg. Veðrið er ringast niðri við havnarlagið, úti á Egg og á Toftanesi. Veðrið er nakað frægari upp í bygdini.

Segði hann frá nógvum vindi av landsynningi, kundi hann halda sær, til tað bleiv ljóst dagin eftir, um tað frysti um kvøldið.




Vindurin av landsynningi er ójavnur. Glaður eru á fjørðinum og rættiligar harðar hvirlur.

Vindferðin á landsynningi er væl meira enn miðalvindferðin fyri landið.

Landsynningur er vát ætt í Leirvík. Um summarið kann hon eisini vera mjørkaætt. Tað kann vera sera tjúkkur mjørki, sum kemur bóltandi við vestfallinum. Eisini kann tað flóta yvir úr Norðragøtu.

Á landsynningi kann vera nógv brim í Leirvík á eystfallinum.

Ættin er góð summarætt og ring vetrarætt.




## Landsynningur sunnan

Veðrið á landsynningi suðuri líkist veðrinum á suðuri



*Mynd 5: Myndin tikin ímóti landsynningi suðuri. Veðrið á hesari ættini líkist veðrinum á suðuri.*

## Sunnan

Sunnan er ikki góð ætt í Leirvík, tá ið nógvur vindur er. Tá er vindurin ójavnur, nógvar hvirlur. Í góðum veðri á sumri er ættin góð.

Tað er ikki minni vindur á suðuri, enn tað er í miðal fyri landið.

Sunnan er ikki ein vát ætt ella mjørkaætt. Gjøgnumgangandi er lítil mjørki í Leirvík, tað er tengt at sjóvarfallinum.

## Útsynningur sunnan

Útsynningur sunnan er ringasta ætt í Leirvík. Hon er ring í allari bygdini. Er nógvur vindur á útsynningi suðuri, er einki skil í hvønn vegin vindurin fer. Í illveðri varð asfalt eina ferð rullað av vegnum sum pappír á útsynningi suðuri.



Í hampuligum veðri er ættin ikki so ring, tá er vindurin javnur. Fer hann upp um 15 ella 20 m/s, eru harðar hvirlur. Skaðavindur.

Vindferðin á útsynningi suðuri er tann sami ella meiri enn miðalvindurin fyri alt landið.

Í Leirvík er altíð ælaveður á lágætt – eisini á útsynningi suðuri.

Ættin er ikki mjørkaætt.

## Útsynningur

Útsynningur er sum útsynningur sunnan, tó ikki líka keðiligur. Hann kemur ikki báðumegin Tindin (Sigatind) men heldur omaneftir.

Vindurin er ójavnur og óstøðugur. Hetta er tann ójavnasta ættin í Leirvík, og tað er ikki minni vindur, enn miðalvindurin er fyri landið.

Á útsynningi kann regna í Leirvík. Ættin er eisini góð terraætt um summarið, men eisini ein ætt við ælingum.

Útsynningur er ikki mjørkaætt.

Yvirhøvur er ættin ikki ein góð ætt. Er lítil vindur, er ættin góð upp í 12 m/s.

## Útsynningur vestan

Er ættin útsynningur vestan kann vindurin vera ójavnur. Hann kemur oman av Ritafjalli.

## Vestan

Vestan er vanliga ein góð ætt í Leirvík. Vindurin er javnur í hampuligum veðri, er nógvur vindur, eru nokkso hørð vindkast.

Vindferðin á vestri er tann sama sum miðalvindferðin fyri landið.

Vestan er ikki ein vát ætt og ikki mjørkaætt.



Mynd 6: Sunnan fyri brimgarðin ímóti vestri.

## Útnyrðingur vestan

Veðrið á útnyrðingi vestri líkist veðrinum á útnyrðingi.

## Útnyrðingur

Á útnyrðingi er vindurin javnur. Hann liggur suður ígjøgnum fjørðin. Kann vera ójavnur í ælingum.

Hann merkist meira suðuri í Leirvík enn norðanfyri. Vindferðin er tann sama sum miðalvindferðin fyri landið.

Á útnyrðingi kann vera ælaveður – ikki samregn. Tað velst um sjóvarfall.

Útnyrðingur er góð terraætt um summarið.

Útnyrðingur er ikki mjørkaætt og er roknað sum ein góð ætt í Leirvík.



Mynd 7: Úr Leirvík í útnyrðing, ígjøgnum Djúpini. Vinstrumegin á myndini er Róvin (*513m*) og høgrumegin sæst Líðarmunnin á Kalsoy. Longst burtur eru Nestindar (788m). Er ættin útnyrðingur ella útnyrðingur norðan, liggur hann suður ígjøgnum fjørðin og er javnur. Eru ælingar, kann vindurin vera ójavnur.

## Útnyrðingur norðan

Veðrið á útnyrðingi norði líkist veðrinum á útnyrðingi.